# Fleiri flogferðir

Atlantsflog fer at gera nakrar eyka flogferðir millum Føroyar og Billund um páskirnar. Felagið sigur, at nógvir danir velja at halda páskafrí í Føroyum, samstundis sum nógvir føroyingar í Danmark vilja sleppa heim at halda páskir. Tí verða tríggjar eyka ferðir millum Billund og Vágar. Atlantsflog ætlar at økja flúgvingina upp á Billund og roknar við at flyta 30.000 ferðafólk á leiðini millum Vágar og Billund í ár, sigur sølustjórin Steffen Riskær.

# Sá skip í havsneyð

Bjargingartænastan í Suðurnoregi setti tilbúgvingina í verk í morgun, tí ein kvinna hevði ringt og boðað frá, at hon hevði sæð eitt fiskiskip, sum var um at søkka nærhendis Sund. Bjargingartænastan sendi alt fyri eitt eina tyrlu avstað, men manningin á tyrluni sá einki fiskiskip. Hinvegin sá tyrlumanningin ein sleipibát, sum var í ferð við at toga eitt skip til lands. Bjargingartænastanb kom tí til ta niðurstøðu, at kvinnan hevði mistikið seg.

# Bjørn og Høgni vunnu finaluna

**Leygarkvøldið 17. mars var finalan í spurnarkappingini á Quiztinum í útvarpinum. Bjørn Kalsø, landstýrismaður, og Høgni Hoydal, løgtingslimur, vunnu finaluna.**

KAPPING
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Eitt sindur var gjørt burturúr leygarkvøldið, tá spurnarkappingin á Quiztinum var í útvarpinum. Fleiri av teimum sum hava luttikið í kappingini í vetur vóru við sum áhoyrarar. Gunnar Nolsøe skipaði fyri spurnarkappingini, og dómari var Hilmar Jan Hansen, útvarpsmaður.

Tað vóru Jan Berg Jørgensen og Høgni Mohr, sum kappaðust ímóti Bjørn Kalsø og Høgna Hoydal.

Úrslitið gjørdist, at Bjørn Kalsø og Høgni Hoydal vunnu við tveimum stigum. Teir fingu 20 stig, meðan Jan Berg Jørgensen og Høgni Mohr fingu 18 stig.

Vinningurin var tvær ferðir tveir apeks-ferðaseðlar við Atlantic Airways til eitt av teirra ferðamálum.



*Eftir spurnarkappingina leygarkvøldið, f.v.: Gunnar Nolsøe, Jan Berg Jørgensen, Høgni Mohr, Høgni Hoydal, Bjørn Kalsø og Hilmar Jan Hansen*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

# Gamalt savn givið út á nýggjum miðli

**Yrkjarin, blaðmaðurin og rapparin Niels Uni Dam hevur á síni myspace síðu givið yrkingasavnið Ongul í Reyv út. Hóast talan er um eina nýútgávu, er savnið frá 1995**

MENTAN
*Tíðindaskriv*

Niels Uni hevur undir nøvnunum Sívar á Seiðabergi og Hákun Spott givið yrkingasøvnini Nudlar (1994) og Rótleys Tøgn (2002) út. Umframt at hava staðið fyri stórum parti av tekstunum hjá MC-Hár. Niels Uni Dam er útbúgvin innan samskifti og heimspeki, við Roskilde Universitetscenter.

Hetta savnið er skrivað undir navninum Sívar á Seiðabergi, og hevur ligið á telduni hjá yrkjaranum seinastu 12 árini. Í 2002 mundi hann givið tað út, tá skrivaði hann hesi fororðini:

"Í einum kjallara uppi Undir Varða eitt seinsummarkvøld í 2002

Hetta savn ætlaði eg at geva út í 1995, men eingin vildi geva tað út, og eg hevði hvørki peningin ella orkuna sjálvur Nú skriva vit 2002, og Barbara, sum eg elski, minti meg á savnið.

Eg hugdi aftur í tað, hevði hug at broyta okkurt, hevði skift nógvar av meiningunum út. Men eg lat vera. Savnið er øgiliga erligt, og eg haldi veruliga at her liggur nógv hjartablóð í tí.

Eg kann ikki standa inni fyri øllum tí sum eg skrivaði tá, men tað kundi eg tá. Eg haldi at hetta savnið er ein stórur partur av mínum



skaldskapið, og tí vil eg geva tað út í óbroyttum líki; so hetta er til minnis um, tá eg var borgarligur."

Nú er savnið givið út, og fær hesi orðini við á vegnum frá yrkjaranum:

"Mars 2007, eg gav ikki savnið út í 2002. Men haldi enn, at tað er stuttligt, kann enn minnið standa inni fyri summum av mínum djúpt borgarligu meiningum, men halt kjaft tær eru sjarmerandi, so her er savnið í eini alnet útgávu."

Savnið kann lesast í fullari longd á síðuni www.myspace.com/nielsuni

TÍÐINDASKRIV




# Barnabókasavnið fingið nýggja heimasíðu

KUNNINGARTØKNI

Slóð til "Títt barnabókasavn" finnur tú á heimasíðuni hjá Býarbókasavninum www.byarbok.fo. Sambært Býarbókasavninum er síðan til øll børn og serliga tín, sum er millum 9 og 14 ár. Ovast á síðuni er eitt bókstavarað, og har kanst tú leita eftir einum ávísum evni. Trýst á byrjanarstavin til tað evnið, tú vilt leita eftir. Um tú til dømis vilt finna bøkur um hundar, so trýst á H, og ein listi kemur fram við evnum, sum byrja við H. Alt er í bókstavarað, so tað er lætt at finna. Mitt á síðuni eru 12 smáar myndir við ymiskum evnum. Tá tú velur eina mynd, kemur ein síða fram við bókapermum. Her kanst tú eisini lesa, hvat bøkurnar eru um. Niðast á síðuni er ein leititeigur. Hevur tú ikki funnið evnið, tú leitar eftir, í bókstavaraðnum, kanst tú royna her. Tú vilt til dømis finna bøkur um gorillur. Skriva gorillur og trýst á "leita á barnabókasavninum" um tú bara vilt hava barnabøkur, ella trýst á "Leita í øllum", um tú vilt hava bæði barna- og vaksnamannabøkur. Leititeigurin kann eisini nýtast, um tú leitar eftir eini bók, og tú veitst, hvussu hon eitur. Skriv tittulin og trýst á "Leita á Barnabókasavninum" ella "Leita í øllum". Til vinstru á síðuni "Títt bókasavn" slóðar til heimasíðuna hjá Býarbókasavninum. "Evnisorð" Uppaftur fleiri evnir. "Júst nú" Her eru nýggjar bøkur og nýggir filmar á Barnabókasavninum. "Bókaummælir" Her kanst tú lesa ummælir, sum børn hava skrivað. "Títt ummæli" Her kanst tú sjálv/ur skriva og senda eitt ummæli til títt barnabókasavn. "Slóðir" Her eru slóðir til ymiskar spennandi heimasíður til børn.

# Vencil bjóðar upplestur á alnetinum

BÓKMENTIR
*Tíðindaskriv*

Skaldskapartíðarritið Vencil bjóðar nú høvundum og lesarum ein nýggjan hátt at koma í samband hvør við annan. Á heimasíðuni www.vencil.fo fer Vencil at byggja upp eitt ljóð- og kykmyndasavn við upplestri av yrkingum, søgum og øðrum bókmentaligum tilfari, sum verður ókeypis atgongt hjá øllum, ið eru knýtt í alnetið. Við hesum vil Vencil eisini vísa á, at skaldskapur kann vera so nógv meira enn tað, sum kemur á prent.

Í fyrstu syftu verður talan um tekstir, sum staðið hava í Vencili, men savnið fer ætlandi eisini at innihalda annað upplisið tilfar, so sum smakkroyndir úr nýggjum útgávum og upptøkur frá tiltøkum við upplestri. Ritstjórnin bjóðar í hesum sambandi rithøvundum, sum geva út ella sum lesa upp á tiltøkum, og sum hava hug at royna seg við hesum nýggja miðli, at gera vart við seg.

Næsta nummar av Vencili kemur út 23. mars. Henda dag klokkan 16.30 verður skipað fyri móttøku í Riti & Ráki við upplestri. Øll bókmentaáhugað eru hjartaliga væl komin til móttøkuna.

Ritstjórar í Vencili eru: Oddfríður Marni Rasmussen og Arnbjørn Ólavsson Dalsgarð, ritstjórar